# Fingu ein ordans skelk frá Almannastovuni

**Ivi hevur nú aftur tikið seg upp, barnafrádráttur skal mótroknast hjá teimum, sum fáa forsorgarhjálp. Almanna- og Heilsumálastýrið sigur nei, kærunevndin í almannamálum sigur ja**

*Áki Bertholdsen*

Tey, sum fáa forsorgarhjálp frá Almannastovuni, fingu ein ordans skelk, tá ið hjálpin skuldi útbetalast nú um mánaðarskiftið.

Tey, sum fáa forsorgarhjálp, betala ikki skatt og tí hava tey hesi seinastu árini fingið barnafrádráttin í skattinum útgoldnan.

Tað hendir eisini nú um mánaðarskiftið.

Barnafrádrátturin er 4.000 krónur í landsskattinum fyri hvørt barnið undir 18 ár, umframt ímillum 2.000 krónur og 4.000 krónur í kommunuskattinum, alt eftir, hvørjari kommunu ein býr í.

Og tá ið forsorgarhjálpin varð útgoldin hesuferð, hevði Almannastovan ikki gjørt mætari, enn at hon hevði mótroknað barnafrádráttin í hjálpini.

Sostatt fingu tey flestu onki útgoldið í fororgarhjálp hesuferð. Tískil høvdu tey so ikki havt nakað at liva av tann næsta mánaðan uttan tað, sum tey fingu útgoldið frá toll- og skatt í barnafrádrátti.

Hetta var ein dyggur, fíggjarligur smeitur hjá teimum, sum fáa forsorgarhjálp og nógv teirra brúktu allan dagin at finna útav, hvat var hent.

Trý tey seinastu árini er barnafrárátturin nevniliga ikki mótroknaður í forsorgarhjálpini og tí skilti ongin, hvat varð hent nú.

Men tey kunnu tó fyribils ugga seg við, at talan var um eitt mistak.

### Almannastovan misskilti støðuna

Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, løgfrøðingur á Almanna- og heilsumálastýrinum, sigur, at áðrenn 1997 varð barnafrádrátturin mótroknaður í forsorgarhjálpini.

Men í 1997 sigur ein tulking hjá landsstýrinum at barnafrádrátturin er ætlaður barninum og hevur tí onki við forsorgarhjálpina at gera. Landsstýrið vísir eisini á, at øll, sum betala skatt, fáa hendan frádráttin um skattin. At mótroknað frádráttin í forsorgarhjálpini, er tí at taka ein rætt frá teimum, sum tey, ið betala skatt, hava. Tað er at gera mismun á fólki og tað ber ikki til.

Tískil hevur barnafrádrátturin ikki verið mótroknaður síðani 1997.

– Men síðani er málið lagt fyri kærunevndina í almannamálum og hon er komin til ta niðurstøðu, at barnafrádrátturin skal mótroknast í forsorgarhjálpini.

Úrskurðurin er latin Almanna- og heilsumálastýrinum, sum síðani hevur sent Almannastovuni hann til viðmerkingar.

Lógfrøðingurin sigur, at tíverri hevur Almannastovan misskilt støðuna.

– Ístaðin fyri at taka heta sum eitt mál, hon skuldi gera viðmerkingar til, hevur Almannastovan fatað hetta sum eini boð frá Almanna- og heilsumálastýrinum um at mótrokna barnafrádráttin í forsorgarhjálpini.

– Men tað var tað ikki. Tískil hevur Almannastovan aftur fingið boð frá Almanna- og heilsumálastýrinum um at regulera útgjøldini aftur beinanvegin, so at barnafrádrátturin ikki verður mótroknaður. Reguleringin verður gjørd beinanvegin og sostatt verður tað ongin, sum missur forsorgarhjálp av teirri grund og tey, sum hava fingið ov lítið útgoldið hesuferð, fáa tað aftur.

– Undir øllum umstøðum ber tað ikki til, at skerja forsorgarhjálpina so brádliga, tí fólk hava fingið at vita frá toll- og Skatt, at tey fáa barnafrádráttin nú og seinastu árini er hann ikki mótroknaður.

– Tí hava fólk havt alla orsøk til at rokna við pengunum og summi hava kanska enntá handla við teimum, sigur Jóan Hendrik Svabo Samuelsen.

Men sum tað sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, fer Almanna- og heilsumálastýrið nú at taka eina nýggja, og endaliga avgerð í málinum.



*– Almannastovan misskilti eitt bræv frá Almanna- og heilsumálaráðnum og tað gav nógvum fólkum ein skelk fyrr í vikuni. Eftir stendur tí, at ivi er nú um, antin fólk hava fingið ein part av forsorgarhjálpini í heimildarloysi tey seinastu árini*

# Hjálpin skal ikki skerjast

**Nú skal ein endalig avgerð takast um, antin tey sum fáa forsorgarhjálp, skulu missa hana av tí, at tey fáa barnafrádrátt útgoldnan, ella ikki. Hjálpin skal ikki skerjast, sigur landsstýrismaðurin**

FORSORGARHJÁLP

*Áki Bertholdsen*

Skulu tey, sum fáa forsorgarhjálp, missa hana, tá ið tey fáa barnafrádrátt útgoldnan frá toll og skattstovuni?

Hendan spurningin fer Almanna- og heilsumálastýrið nú at viðgera og avgreiða einaferð við alla.

Síðani 1997 hevur barnadrádrátturin ikki verið mótroknaður í forsorgarhjálpini. Men, sum tað sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, er kærunevndin í almannamálum nú komin til ta niðurstøðu, at barnafrádrátturin skal mótroknast.

Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, løgfrøðingur á Almanna- og heilsustýrinum, sigur, at eftir úrskurðin í kærunevndini, er tað neyðugt at taka málið uppaftur.

– Vit fara nú at viðgera málið av nýggjum og so taka vit eina endaliga avgerð um, hvat tann rætta tulkingin av reglunum er. Tann rætta tulkingin skal síðani staðfestast og síðani fær Almannastovan endalig boð um, hvussu farast skal fram.

Lógfrøðingurin sigur, at málið verður tikið upp beinanvegin í komandu viku.

Hann sigur, at vísir tað seg so, at tað er rætt at mótrokna barnafrádráttin, eins og kærunevndin sigur, so verður tað gjørt hereftir.

– Tað má Almannastovan so fáa at vita beinanvegin, so at hon fær givið sínum viðskiftafólkum, sum fáa forsorgarhjálp, boð í góðari tíð um, at hereftir verður barnafrádrátturin mótroknaður í veitingini.

Lógfrøðingurin sigur, at tað verður í øllum førum tulkingin hjá Almanna – og heilsustýrinum, sum verður galdandi, um ikki onkur tekur onnur stig í málinum, tvs, leggur málið fyri landsstýrismálanevndina ella fyri rættin.

Tað verður so ikki aktuelt fyrrenn næsta vár, tá ið barnafrádrátturin verður útgoldin aftur.

Men verður niðurstøðan, at barnafrádrátturin skal mótroknast, hava tey, sum hava fingið forsorgarhjálp og barnadrádrátt, fingið forsorgarhjálp í heimildarloysi um mánaðarskiftið februar/mars hvørt ár síðani í 1997.



*– Nú skal allur ivi beinast burtur. Men hjálpin skal ikki skerjast, sigur Sámal Petur í Grund*

### Skal ikki skerjast

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sigur, at tað verður neyðugt at fáa viðurskiftini í rættlag beinanvegin. Hann viðgongur, at tá ið kærunevndin ikki kemur til sama úrslit sum Almanna- og heilsumálastýrið, er tað okkurt, sum bendir á, at lógin er ikki nóg greið.

– Tann spurningurin má avgerðast einaferð við alla. Og verður tað neyðugt at fara í tingið í málinum, verður tað gjørt.

Landsstýrismaðurin sigur, at undir øllum umstøðum er tað tann greiði, politiski viljin og tann greiða, politiska ætlanin, at barnafrádrátturin skal ikki mótroknast, og at tey, sum fáa forsorgarhjálp, skulu eisini hava óskerda hjálp tann mánaðin, barnafrádrátturin verður útgoldin.

IDÉ-møblar á Hálsi valdi sjálvandi garaguhurð og brandhurðar frá… Lindab



www.reproz.com

JÓGVAN ELIAS Á LØGMANSBØ Lindab Doorline, einaumboð · Free-lance port montørur · 100 Tórshavn · Tel 21 78 02 · Fax 32 13 86



# Mótmæla politisku støðuni

**Undir heitinum »Nú er nokk!« skipar Unga Tjóðveldið í dag fyri stórum mótmælistilataki á Vaglinum í Havn um gongdina í málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya**

MÓTMÆLI

*John Johannessen*

Unga Tjóðveldið hevur mist tolið við gongdini í málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

– Vit halda, at nú er nóg mikið slakað. Tí skipa vit fyri hesum fólkafundi, fyri at gera vart við støðu okkara, sigur Annlis Bjarkhamar, forkvinna í Unga Tjóðveldinum.

Limirnir í politiska ungdómsfelagsskapinum eru ónøgdir við, at løgmaður av sínum eintingum hevur gjørt av at avlýsa fólkaatkvøðuna um ein bundnan fullveldisleist, sum skuldi vera 26. mai.

– Løgmaður hevur við hesum í veruleikanum tikið avgerðarrættin frá Føroya fólki. Tað vóru Føroya fólk, sum skuldu taka avgerð í hesum máli, men eftir, at løgmaður avlýsti fólkaatkvøðuna, er hesin avgerðarrættur burtur, sigur Annlis Bjarkhamar.

### Ein dag ov seint

Fólkafundurin í dag er í veruleikanum ein dag ov seint. Tí tað var í gjár, eftir at Sosialurin var prentaður, at endalig avgerð skuldi fella í samgongustríðnum um fullveldistilgongdina. Men Annlis Bjarkhamar heldur kortini ikki, at tað bilar, at fólkafundurin er dagin eftir, at avgerðin er fallin.

– Vit vilja gera vart við, at vit ynskja føroyskt fullveldi. Og líkamikið hvørja niðurstøðu landsstýrið kemur til í samgongustríðnum, er okkara mál tað sama, sigur Annlis Bjarkhamar.

Forkvinnan í Unga Tjóðveldinum ásannar kortini, at úrslitið av samgongustríðnum sjálvsagt fer at ávirka fundin, sum í veruleikanum er ein mótmælisgonga.

### Fleiri røðarar

Tá Sosialurin tosaði við Annlis Bjarkhamar fyrrapartin í gjár, var hon enn ikki heilt liðug at fyrireika fólkafundin. Enn vantaði at fáa nakrar avtalu upp á pláss.

Kortini kann staðfestast, at talan er um eitt stórt tiltak, við sangi tónleiki og fleiri røðum. Millum røðararnar verða Sjúrður Skaale, fyrrverandi embætismaður í Tinganesi, Álvur Kirke úr Miðflokkinum, Jóannes Nielsen, Karl Johan Jensen og Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum.

# Høgni stendur skúlarætt

**Løgmaður kom aftur í Tinganes um nýggju tíðina gjáramorgunin. Hann fór nærum beinan vegin í einrúm við Høgna Hoydal at viðgera samgongukreppuna. Krøvini frá løgmanni vóru, at Høgni Hoydal skal taka uppskot síni um fólkaatkvøðu og sjálvsavgerðarrætt aftur**

SAMGONGUKREPPA

*John Johannessen*

Fríggjadagin: 12.09: Tað er tøgn í Tinganesi. Fartelefonirnar hjá løgmanni og varaløgmanni eru sløktar, og boðini frá embætisfólkunum eru, at menninir skulu ikki órógvast.

Tað er nú lagnan hjá samgonguni skal avgerast. Anfinn Kallsberg, løgmaður, og Høgni Hoydal varaløgmaður, eru grundleggjandi ósamdir.

Ørðumegin vil Høgni Hoydal hava uppskotini um ávikavist bundnan sjálvstýrisleist og um sjálvsavgerðarrætt føroyinga løgd fram í tinginum leygardagin klokkan 13.30, tá Finnbogi Ísakson, tingformaður, kunnger seinastu framløgurnar hesa tingsetuna. Høgni Hoydal hevur longu móti vilja løgmans borið løgtingsskrivstovuni uppskotini.

Hinumegin heldur Anfinn Kallsberg, at Høgni Hoydal hevur framt álitisbrot móti sær og samgonguni, tá hann, meðan løgmaður var í Bretlandi, bar løgtingsskrivstovuni uppskotini móti vilja løgmans. Løgmaður krevur treytaleyst, at Høgni Hoydal skal taka uppskotini aftur áðrenn komandi tingfund.

– Eg standi við tað, sum eg havi sagt, um at eingin uppskot skulu niðan í tingið fyrr enn samgongan er samd. Men lat okkum nú síggja, hvussu dagurin gongst, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður við InternetSosialin fríggjamorgunin beint áðrenn fundin við Høgna Hoydal.

Tá Sosialurin fór til prentingar klokkan 12.30 fríggjadagin var fundurin enn ikki liðugur. Slaturin gekk tá kortini um, at samgongan fór at slitna, men hesi tíðindi fingu vit ongastaðni váttað. Tvørturímóti søgdu bæði Óli Breckmann og Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum, at samgongan fór at halda.

Fólkaflokkurin sat meginpartin av degnum í gjár í hølum sínum á Gamla Apoteki, meða løgmaður og Høgni Hoydal fundaðust.

Eisini Javnaðarflokkurin sat á fundi um støðuna. Hann viðgjørdi møguleikan fyri at fara upp í eina nýggja samgongu, um hetta gjørdist aktuelt.




Íroknað er ferðing aftur og fram við Atlantic Airways og gisting í Rosemount Skenehouse íbúð í fýra nætur. Prísurin er treytaður av, at seks fólk ferðast saman og búgva í somu íbúð. Íbúðin hevur 3 sovikømur, køk, bað og stovu við sjónvarpi og telefon. Møguleiki er eisini at fáa íbúðir til ávikavist 4, 2 og 1 fólk ímóti eykagjaldi. Tilboðini eru galdandi vikuskiftini 22. - 26. mars og 29. mars - 2. apríl. Ferðaavgjaldið sum er 532,- skal leggjast afturat prísinum.

SANSIR · TEL 355 355

Atlantic Airways

Tel 333 900 · www.atlantic.fo

Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið